## Tjóðveldisfólk mest burtur

**UPPMØTING** Í miðal er fráveruprosentið hjá tingbólkinum hjá Tjóðveldinum 13. Sambandsflokkurin stendur fyri bestu uppmøtingini. Flokkurin hevur eitt miðalfráveruprosent upp á 7,5

Eirikur Lindenskov

Miðalfráveran hjá tingbólkinum hjá Tjóðveldinum er 13 prosent. Tilsamans 48 ferðir hevur ein sessur hjá Tjóðveldinum staðið tómur seinastu 46 tingfundirnar. Tað merkir, at í miðal hevur tingbólkurin hjá Tjóðveldinum ongantíð verið fullmannaður. Hetta gevur eina miðalfráveru upp á 13 prosent.

Næstur á listanum er Fólkaflokkurin. Miðalfráveran hjá teimum er 12,4%, og hava tey sjey tingfólkini hjá Fólkaflokkinum verið burtur 40 ferðir hesar seinastu 46 tingfundirnar. Her er vert at leggja til merkis, at eisini tvey av varafólkunum hjá Fólkaflokkinum eru komin upp á fráverulistan.

Nummar trý á listanum er Javnaðarflokkurin. Tingbólkurin hjá Javnaðarflokkinum hevur tilsamans verið burtur í 27 tingfundir, tað gevur eina fráveru upp á 9,8 prosent.

Miðflokkurin hevur eina miðal fráveru upp á 8 prosent.

Sjálvstýrisflokkurin hevur eina miðalfráveru upp á 7,6 prosent.

Og bestu uppmøtingini standa umboðini hjá Sambandsflokkinum fyri. Tey sjey sambandsfólkini hava »einans« verið burtur 24 ferðir tilsamans, og tað gevur eitt fráveruprosent upp á 7,5.

# Burtur fjórða hvønn tingfund

**UPPMØTING** Sjúrður Skaale er tann tingmaður, sum møtir ringast upp til tingfundir. Honum á baki koma Høgni Hoydal, Magni Laksafoss, Óli Breckmann og Heðin Zachariassen

Eirikur Lindenskov

| | Tingfólk | Burtur | Flokkur | % |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Sjúrður Skaale | 11 | Tjóðveldi | **23,9** |
| 2 | Høgni Hoydal | 10 | Tjóðveldi | **21,7** |
| 3 | Magni Laksáfoss | 9 | Sambandsflokkurin | **19,6** |
| 4 | Óli Breckmann | 9 | Fólkaflokkurin | **19,6** |
| 5 | Heðin Zachariasen | 9 | Fólkaflokkurin | **19,6** |
| 6 | Poul Michelsen | 8 | Fólkaflokkurin | 17,4 |
| 7 | Jákup Mikkelsen | 8 | Fólkaflokkurin | 17,4 |
| 8 | Bergtóra Høgnadóttir Joensen | 8 | Tjóðveldi | 17,4 |
| 9 | Edmund Joensen | 7 | Sambandsflokkurin | 15,2 |
| 10 | John Johannessen | 7 | Føroya Javnaðarflokkur | 15,2 |
| 11 | Bjørt Samuelsen | 7 | Tjóðveldi | 15,2 |
| 12 | Hergeir Nielsen | 6 | Tjóðveldi | 13,0 |
| 13 | Eyðgunn Samuelsen | 6 | Føroya Javnaðarflokkur | 13,0 |
| 14 | Marjus Dam | 6 | Sambandsflokkurin | 13,0 |
| 15 | Gerhard Lognberg | 5 | Føroya Javnaðarflokkur | 10,9 |
| 16 | Jenis av Rana | 5 | Miðflokkurin | 10,9 |
| 17 | Andrias Petersen | 4 | Føroya Javnaðarflokkur | 8,7 |
| 18 | Bjarni Djurholm | 4 | Fólkaflokkurin | 8,7 |
| 19 | Kári P. Højgaard | 4 | Sjálvstýrisflokkurin | 8,7 |
| 20 | Bill Justinussen | 3 | Miðflokkurin | 6,5 |
| 21 | Katrin Dahl Jakobsen | 3 | Føroya Javnaðarflokkur | 6,5 |
| 22 | Kári á Rógvi | 3 | Sjálvstýrisflokkurin | 6,5 |
| 23 | Karsten Hansen | 3 | Miðflokkurin | 6,5 |
| 24 | Annita á Fríðriksmørk | 2 | Tjóðveldi | 4,3 |
| 25 | Bjørn Kalsø | 2 | Sambandsflokkurin | 4,3 |
| 26 | Heini O. Heinesen | 2 | Tjóðveldi | 4,3 |
| 27 | Tórbjørn Jacobsen | 2 | Tjóðveldi | 4,3 |
| 28 | Hans Pauli Strøm | 2 | Føroya Javnaðarflokkur | 4,3 |
| 29 | Kitty May Ellefsen | 1 | Fólkaflokkurin | 2,2 |
| 30 | Rodmundur Nielsen | 1 | Fólkaflokkurin | 2,2 |
| 31 | Alfred Olsen | 0 | Sambandsflokkurin | 0,0 |
| 32 | Anfinn Kallsberg | 0 | Fólkaflokkurin | 0,0 |
| 33 | Jógvan á Lakjuni | 0 | Fólkaflokkurin | 0,0 |
| 34 | Helgi Abrahamsen | 0 | Sambandsflokkurin | 0,0 |
| 35 | Edva Jacobsen | 0 | Sambandsflokkurin | 0,0 |
| | Tal av fundum | 46 | | |

Tað vísir uppgerðin úr gerðabókini hjá løgtinginum fyri teir 46 fundirnar, sum eru førdir í gerðabókina, síðani tingsetan byrjaði á ólavsøku.

Sjúrður Skaale hevur verið burtur frá 11 av hesum 46 fundum, tað gevur eina fráveru upp á 23,9 prosent. Næstringastur til at møta upp er formaðurin í Tjóðveldinum, Høgni Hoydal, sum hevur verið burtur í 10 av hesum 46 fundum. Tað gevur eina fráveru upp á 21,7 prosent.

Á einum deildum triðjaplássi á skulkingarlistanum hjá løgtinginum eru Magni Laksafoss úr Sambandsflokkinum, Óli Breckmann og Heðini Zachariasen úr Fólkaflokkinum sum hava verið burturstaddir níggju av hesum 46 tingfundum, tað gevur eina fráveru upp á 19,6 prosent.

Tá miðlarnir gera hesar uppgerðir yvir, hvussu okkara kosnu menn og kvinnur møta upp á tingi, so plaga umberingarnar at vera, at tað mangan er trupult hjá fólki í útjaðaranum at klára at møta upp til allar fundir. Men hendan umbering heldur ikki í hesum føri. Tann ringasti at møta upp av útjaðaratingfólkunum, er tingformaðurin sjálvur, Hergeir Nielsen, sum hevur verið burtur frá fundi seks ferðir síðani ólavsøku, og sum soleiðis hevur eitt fráveruprosent upp á 13. Á einum vanligum arbeiðsplássi - ella skúla, hevði hetta verið mett sum kritiskt.

Vit høvdu hetta málið uppi at venda, eftir at Bjørt Samuelsen og Sjúrður Skaale í november vóru í New York, har tey millum annað runnu marathon, meðan tingfundir samstundis vóru - og teirra sessir stóðu tómir.

Tá fingu vit eitt heldur hvast aftursvar, tí vit í Miðlahúsinum áttu at vitað, at tingarbeiðið er so nógv annað enn at sita á tingfundi. Tey søgdu, at tað ber væl til at skriva álit ella gera okkurt annað politiskt arbeiði, meðan tú ert burturstaddur. Tey brikslaðu okkum, at hetta var skandalujournalistikkur.

Men tað sum tá skar í eyguni við fráveruni hjá tjóðveldistingfólki var, at eingin teirra hevði havt farloyvi síðani hálvan mars. Tí kundi tað tykjast, sum um tey ikki vildu hava Páll á Reynatúgvu ella Heidi Petersen á ting, men hetta avvístu tey. Høgni Hoydal boðaði frá, at hann royndi eftir førimuni at røkja bæði starvið sum løgtingsmaður og fólkatingsmaður - og tók farloyvi, tá tað var neyðugt. Uppgerðin vísti tó, at síðani seinasta farloyvi hansara í mars til hálvan november, hevði Høgni Hoydal ikki møtt á fjórða hvørjum tingfundi - ella at hann hevði eina fráveru upp á 25 prosent.

Sjúrður Skaale hevði eitt heilt annað sjónarmið, tá hann var fólkatingsmaður fyri Høgna Hoydal, sum var landsstýrismaður í 2008. Sjúrður Skaale boðaði greitt frá, at tað ber ikki til at røkja tingmannastørv í tveimum tingum í tveimum londum samstundis, og tí niðurlegði hann tingsessin permanent tað tíðarskeiðið, hann var í Fólkatinginum. Hesa støðu hevur hann endurtikið síðani.

Um tað er rætt ella ikki við slíkum uppgerðum, skulu vit lata standa ósvarað, men tá løgtingið førir protokoll á hendan hátt, so tað neyvan ógrundað.

**4,8**

Tað er miðalfráveran hjá tingfólki teir 46 tingfundirnar, sum hava verið í hesari tingsetuni, sum byrjaði á ólavsøku. Tilsamans 157 ferðir hava tingfólk ikki verið á fundi.